# Alan Brockie og Mini bilarnir



Alan hevur ikki slept Mini bilunum heilt. Hann eigur framvegis onkran Mini í heima í garaguni. Hesin er ein Mini 1100 Special frá 1979

Mynd: Jens Kristian Vang

**Næsta ár eru liðin 50 ár liðin síðan fyrstu Austin/Morris Mini komu á marknaðin í 1959. Ein sum í næstan 30 ár koyrdi við Austin Mini er Alan Brockie í Havn, sum framvegis eigur onkran gamlan Mini í garaguni**



Her eru tveir Mini hjá Alan undirkavaðir fyrst í 80-unum. Smádrongurin er sonurin Tommy Brockie

Mini bilarnir vóru sera væl umtóktir fyrstu nógvu árini eftir at teir komu á marknaðin. Eisini her hjá okkum vóru teir nógv seldir bæði sum Austin og Morris. Sigird av Reyni seldi Morris og Charles Mauritzen & Co seldi Austin. Bilarnir vóru teir somu við hvør sínum navni.

Fyrtøkan Charles Mauritzen & Co varð vanliga nevnd "hjá Brockie", tí tað var Brockie familjan sum rak føroysku deildina hjá ensku fyritøkuni.

Alan Brockie byrjaði sum 17 ára gamal í 1964 at arbeiða á goymsluni í fyritøkuni.

Hann var bert 18 ára gamal, tá hann keypt sín fyrsta Austin Mini. Bilin keypti hann sum eitt ára gamlan frá Hans Jacob Hermansen, sum í dag er koyrilærari í Havn.

Alan hevur annars arbeitt mest við bilum og myndum. Í fyrsta atløgu arbeiddi hann á eykaluta-goymsluni til 1974, tá hann fór at arbeiða sum myndamaður burtur-av saman við Kalmari Linden-skov. Teir góvu t.d. út mynda-